# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# »Míni Jól« endurútgivin




Tað var í 1988, at familjujólabandið „Míni Jól" kom út. Tað eru tey vælkendu systkinini Mirjam, Sofus, Rutt, Myrna og Lydia, sum saman við børnum og pápanum Finni sungu á hesum bandi. Talan er um eina samanblanding av røddum til ymisku sangirnar, bæði sum solistar og bólkar. Sangúrvalið var sera blandað av bæði vælkendum føroyskum jólasangum, men eisini týddir norðurlendskir og amerikanskir sangir vóru við.

Á upptøkunum, sum vóru gjørdar í REMA-studio í Runavík luttólku einans føroyskir tónleikarar.

Tað hevur leingi verið ætlanin at geva hesa útgávu út aftur, og eftir fleiri staðiligar áheitanir í ár er nú endiliga tikin avgerð um, at so skal vera. Eitt heilt ættarlið er farið og økist familjan sjálvandi í báðar ættir, og vil hetta tí vera eitt kærkomið høvi hjá mongum familjum at ogna sær góðar jólasangir, nú jólahátíðin stundar til. Sangirnir og tónleikurin skapa serstakan jólahugna.

Fløgan verður at fáa á vanligum sølustøðum kring landið, mikudagin 9. desembur.

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Johan Olevinus Frithiof Olsen, vanliga nevndur Frithiof, búsitandi í Rituvík**, andaðist í heiminum sunnudagin, 66 ára gamal.

# MERKISDAGAR

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 7. des. hava Anna og Kári Egholm Jacobsen, Glyvrar, verið gift í 25 ár. Veitsla verður 19. des. í Bygdarhúsinum í Leirvík fyri innbodnum.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 8. des. hava hjúnini Lis og Herluf Olsen, Sørvágur, verið gift í 25 ár. Tey eru burturstødd.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 15. des. hava vit Kára og Abraham Løkin, Runavík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík frá kl. 18. Tey ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 221980 (abraham) ella 272777 (Kára) áðrenn fríggjadagin 11. des.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. des. halda við bæði, Pálin og Henry Olsen, Rituvík okkara silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin við veitslu í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tit, ið ynskja at gleða okkum við at koma, kunnu siga frá á tlf. 219134 (Henry) ella 223534 (Pálin). Til ber eisini at senda ein teldupost: henry-o@olivant.fo ella palin.olsen@skulin.fo áðrenn 15. desember.

# Nýggj føroysk tekniseria



*Tað er Bergur Dalsgaard, sum gevur Børk Hanagleiv út*




Tað er ikki á hvørjum degi, at ein føroysk tekniseria kemur út. Ein nýggj bók er nú útkomin um føroysku tekniseriuhetjuna Børk Hanagleiv. Í bókini "Børkur Hanagleiv 2" kanst tú lesa bestu og skemtiligastu søgurnar, ið hava verið at lisið í Dimmalætting seinastu mongu árini. Bókin kostar 99 kr og hóskar væl til bæði børn og vaksin.

Teknirøðin sá fyrstu ferð dagsins ljós í 1985, tá hon var útgivin í dagblaðnum 14. September undir heitinum „Sigmar Hanagleiv og aðrir". Í 1986 kom hon í Barnablaðið, har hon helt áfram við onkrum støðgi inntil 1994. Í 2000 fekk Børkur so pláss í Dimmu, har hann kundi lesast hvørja viku fram til 2008. Í 2004 fekk hann eisini eitt comeback í Barnablaðnum, har hann nú er at síggja í litum.

## Dagurin

**8. desember. Gitnaðardagur Mariu.** Mariumessa, hildin til minnis um tá ið hon varð gitin í móðurlívi.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

